# Lutvísa sólarmyrkingin ígjøgnum sunspottara

**Næmingar á Miðnámsskúlanum eygleiddu sólarmyrkingina mikudagin ígjøgnum sunspottara**



Tann 29.03 var lutvís sólarmyrking og sást hon týðuliga í Vági.

Næmingar í 2.x á Miðnámsskúlanum í Suðuroynni eygleiddu mikudagin sólarmyrkingina ígjøgnum sunspottara, sum er eitt tól, sum gjøgnum linsur og spegl avmyndar sólskivuna niður á eitt pappír, soleiðis at óneyðugt er at nýta serligar sólbrillur.

Á myndum, sum Gudfinn Olsen tók, sæst, at mánin bert fjaldi lítlan part av sólini, tá myrkingin var upp á sítt mesta umleið kl. 11.30.







# Smálombini komin

**Fyrstu smálombini hava sæð dagsins ljós, hóast veðrið enn ikki boðar frá vári**

LOMB
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Um hesi lombini á myndini eru tey fyrstu í ár er ilt at siga, men tey eru millum tey fyrstu í Vági. Tey sóu dagsins ljós tann 28. mars. Mamman er sostatt tvílemba. Hon er sjey vetrar gomul og hevur fleiri ferðir áður lembt tvey lomb, men ongantíð innan 1. apríl.

Lombini bæði hava tað gott, hóast kalt er og vátakavi tykist vera av og á.

Niels Petur Nolsøe í Vági eigur lomb og ær.





## Trivnaðarstjóri

Nú trivnaðarstjóri okkara er farin í annað starv, søkja vit eftir nýggjum trivnaðarstjóra.

**Arbeiðsøki**

Tað eru sera fjølbroyttar uppgávur á trivnaðarøkinum og nógv samskifti úteftir. Sum trivnaðarstjóri fært tú ábyrgd av trivnaðarøkinum, sum fevnir um sosialu deild, barna- og ungdómsdeildina og mentamáladeildina.

Saman við politiska myndugleikanum og stjórnini kemur tú at seta kósina á trivnaðarøkinum. Eisini standa stórar avbjóðingar fyri framman, t.d. útbyggingar á skúlaøkinum, yvirtøka av eldraøkinum og umskipan av stuðulsfólkaskipanini.

Trivnaðarfyrisitingin umsitur árliga umleið 210 mió. kr. í rakstri, umframt 37 mió. kr. innan eldraøkið, sum verður endurrindað av landinum. Íløgujáttanin er 37 mió. kr. í 2006.

Saman við borgarstjóra, kommunustjóra, miðfyrisitingarstjóra og tekniska stjóra verður tú partur av leiðslutoyminum í kommununi.

**Førleikakrøv**

Vit høvdu hugsað okkum, at tú sum trivnaðarstjóri gongur á odda at menna trivnaðarøkið, er nýskapandi og hevur dirvi at ganga nýggjar leiðir. Sum trivnaðarstjóri er tað ein fyrimunur, at tú hevur útbúgving á kandidatstøði, hevur fyrisitingarligar- og leiðsluroyndir og gott fíggjarligt innlit.

Er hetta nakað fyri teg? Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss í stórari menning, har møguleikin er stórur at síggja úrslit í orði og verki.

Treytað av góðkenning fíggjarmálaráðharrans er starvið tænastumannastarv lønt í 38. lønarflokki við tvey ára royndartíð.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tel.: 30 20 10.

Umsókn og avrit við prógvum, ævisøga (Curriculum vitae) o.ø. skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2006 kl. 12.00.

Viðmerkið umsóknina: Trivnaðarstjóri.

REPROZ

Tórshavnar kommuna